**J**.nr. 16/02458-1

**Leiðreglur fyri upptøku av gestanæmingum**

**Heimildir og lógargrundarlag**

Sambært fólkaskúlalógini hevur kommunustýrið ábyrgdina av rakstrinum av skúlunum í kommununi. Kommunustýrið hevur skyldu at skipa fyri, at **íbúgvarnir** í kommununi hava møguleika at fáa undirvísing sambært § 26 í lógini, og at fígging er tøk til hetta.

Rætturin til skúlagongd í eini kommunu er tengdur at bústaðnum.

Í § 40 í fólkaskúlalógini stendur: Eitt hvørt barn, sum býr her á landi, hevur undirvísingarskyldu eftir reglunum í §§ 42-44, uttan so er, at galdandi er fyri tað reglur um undirvísingarskyldu í aðrari lóggávu. Sama er galdandi fyri børn, sum skulu vera her í landinum í minsta lagi 6 mánaðir.

Næmingar, sum búgva uttanlands, kunnu ganga í skúla/forskúla her í eitt **stutt** tíðarskeið í hesum førum:

- Eru og ferðast hjá familju.
- Búgva hjá familju eina tíð, tí foreldur eru sjúk e.l.
- Foreldur eru heima í starvsvenjing í sambandi við útbúgving
- Foreldur eru útsend av arbeiðsplássinum.
- Næmingur býr hjá tí foreldrinum, sum barnið ikki hevur bústað hjá.
- Næmingar hava gingið í flokkinum fyrr og eru heima og ferðast

Tá tikið verður ímóti næmingum, er umráðandi, at vissa er fyri, at bæði foreldrini, um so er, at tey hava felags foreldrarætt, ynskja, at barnið er gestanæmingur eina tíð.

Tað er ikki vist, at gestanæmingur kann fáa pláss í frítíðarskúla, hóast pláss er í skúlanum.

Eru ivamál, tekur skúlin málið upp við Mentamáladeildina.

*Samtykt í mentamálanevndini 31. august 2016.*